# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




# PUMA – til býkoyring

Á bilaframsýningini í New York presenteraðu General Motors og Segway Personal Transporter í New Hampshire eitt eldrivið akfar til tveir persónar.

Talan er um eitt akfar á tveimum hjólum, ið hevur fingið navnið PUMA (Personal Urban Mobility and Accessibility) og er til transport í ferðsluni í býnum.

Segway Personal Transporter hava spesialiserað seg í smáum akførum til ein ella tveir persónar, sum verða nógv nýtt av t.d. politinum og militerinum.

Prototypan kombinerar framkomna intelligenta tøkni frá bæði General Motors og Segway Personal Transporter sum t.d. battarítøkni, dynamiskan stabilitet til balansering á tveimum hjólum, elektroniska stýring av róðurgreiðum, bremsum og automatiskari parkering.

Battaríini koyra umleið 60 kilometrar millum hvørja løðing, og toppferðin er umleið 60 km/t.

**mg**



*PUMA (Personal Urban Mobility and Accessibility) er til transport í ferðsluni í býnum*






*Motorsúkklurnar vera parkeraðar á parkeringsøkinum hjá Ebenezer*

# MC-Gudstænasta

Felagið Cross-Bikers MC Føroyar skipaði seinasta leygardag fyri einum tiltakið, sum byrjaði á Velbastaðhálsi og endaði við MC-Gudstænastu í Ebenezer.

Á Velbastaðhálsi varð vitjað hjá RC-felagnum, har limir í felagnum vístu teirra kynstur við m.a. fjarstýrdum tyrlum, flogførum og bilum. Petur Hermansen, ein av teimum elstu limunum í felagnum greiddi frá allari gongdini við felagnum fram til í dag.

Síðan var felagskoyring heim í Ebenezer í Havn til MC-Gudstænastu. Ebenezerkórið, undir leiðslu av Alexander Samuelsen, sang, og Petur H. Jacobsen, sum sjálvur er bikari, sang eisini tveir sangir.

Osmund Justinussen helt taluna. Hann hevði sjálvur sum ungur átt bæði skutarar og motorsúkklur, og greiddi hann frá, hvussu væl honum hevði dámt hetta lívið. Eisini varð biðið fyri teimum sum koyra, at Harrin má varðveita tey frá øllum vanda og vanlukkum, nú sesongin byrjar.

Gudstænastan endaði við at tjóðsangurin varð sungin. Eftir tað vóru øll boðin til kaffi og køkur.

**mg**